# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**15. sunnudag e. trin.**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Ann Hansen, cand.theol. og Heri J. Joensen
***Argir:*** kl.11, Hanus Simonsen
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Bjarni Bæk
***Vestmanna:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam
***Kaldbak:*** kl. 12, Sonja Klein
***Kirkjubø:*** kl. 12.15, Hanus Simonsen
***Gásadalur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Oyndarfjørður:*** kl. 12 Jógvan Fríðriksson
***Haldarsvík:*** kl. 11,
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Hósvík:*** kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Rituvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð
***Leirvík:*** kl. 11, altargongd, Sverri Steinhólm.
***Talvan gongur fyri Bróðurringin á havinum***
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10, Niels Pauli Danielsen
***Norðoya røktarheim:*** kl. 14.30
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Lestur
***Viðareiði:*** kl. 11, altarg., Elsa Funding
***Tvøroyri:*** kl. 11, deyvagudstænasta, altargongd, Jónsvein Bech. ***Talvan gongur fyri deyvameinigheitina***
***Øravík*** kl. 12, John Myllhamar
***Sumba:*** kl. 11,
***Vágs eldrabýli:*** kl. 14, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl. 12.30, altarg.,
***Sandvík:*** kl. 18, altarg., Símun Jacobsen

**Gudstænasta**
**Týsdagin 18. september:**
Fuglafjørður kl. 15.30, altargongd, Uni Næs. Gudstænastan verður løgd til rættis saman við Heimatænastuni.

**Ferming**
Konfirmantarnir í heyst í Norðoya vestara prestagjaldi møta í kirkjuni týsdagin hin 18. septembur 2007 kl. 17. Konfirmasjónin verður í Klakksvík 18. s. e. trin. hin 7. oktobur 2007 v/Niels Paula Danielsen.

**Konfirmantar í Vága prestagjaldi**
byrja at ganga til mánadagin 17. sept. kl. 14 í prestagarðinum. Konfirmatiónin verður í Miðvágs kirkju sunnudagin 7. okt. kl. 11.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag k. 11.30.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við sálmum á ymiskum málum v/ Daniel Nørgaard, prestur í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími. Kl. 11 gudstænasta, Jóhan Sivertsen.

**Aglow**
Leygarkvøldið 15. september kl. 19.30 húsmøti fyri kvinnur hjá Lív Jacobsen Heygskrókur 13 Tórshavn.
http://www.aglow.fo

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Hera Kjærbo, evni: Jesus sum leiðari.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli. (Liggur í gudstænastutíð.)
Sunnudagin kl. 18 Orðið er frítt!- Upplegg og bólkaprát. Øll eru hjartaliga vælkomin! Sí annars www.koma.fo
Mánakvøldið 17. sept. kl. 20 Sjómanskvinnuringurin byrjar aftur. Vit savnast á kirkjuloftinum. Allar kvinnur vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 20 SANG-KVØLD, Eddi, Svein og onnur úr Suðuroy skipa fyri, drekkamunnur.
Sunnudag kl. 11 fundur, Toril og N.E. Olsen tala og leiga.
Sunnudagskúli kl. 14.
Sunnudag kl. 18 fundur, Bernhard Petersen talar. suppa, sápa og frelsa síðan 1865.
www.frelsunarherurin.fo

**Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11, Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt kl. 20 Kvinnumøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti v/ Tummas Lauritsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Flare
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 16. september Kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Djóni Thomassen talar á møtinum, um evni hjúnalag.
Kl. 20.00 Tey ungu samlast heima hjá Fríðu Laksáfoss, Rygsgøta 8.
Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12.00.
Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadag 14. til sunnudagin 16. september: KFUK kvinnulega á Klaksvíkar sjómansheimi. Tilm. á tlf. 211824 ella 311928 áðrenn 13. sept. kl. 12. Tað er ikki neyðugt at verða limur fyri at vera við.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/Hendrik T. Olsen, kl 14.00 sunnudagsskúli kl 18.00 møti v/Eivind Bech og Sólrun Poulsen, Hallmar Winther singur.
Mánadagin kl 17.15- 18.00 venur barnakórið kl 20.00 bønamøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har talar Símun Absalonsen, evnið »Hvar er Gud«. Barnaansing undir báðum møtinum.
Kl. 12 er Sunnudagsskúlin.
www.livdin.fo

**Samkoman Immanuel Brekkutún 3**
Fríggjadag 14. sept. Kongsins Herlið kl 19, Ungdómsmøti kl. 21.
Leygardag 15. sept kl. 10 Kongsins Herlið útferð .
Sunnudag kl. 12 Sunnudagsskúlamøti. Sunnudagsskúli fyri børn og vaskin. Drekkamuður er frá kl. 11.
Mikudagin 19 sep. Bíbliutími kl. 20.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla Dánial á Dul Jacobsen talar, kl 18 temakvøld: »Skild og hvat so?«.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vakhús, Sandavágur**
Samkoman Nardus hevur møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 15.9.2007 kl. 19.
Talari: Hallur Sørensen

**Filadelfia, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Rúni Rasmussen talar.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.

**KEDRON í Sørvági**
***Sunnudagin 16.09.2007.***
Breyðbróting við Læru kl. 11.00.
Evangeliskt møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Børnini at møtast:***
Børnini møtast kl. 11.00 í kjallaranum í KEDRON, har ØLL børn eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 19.09.2007.***
Møti við Robert Mc Clucky úr Norður Írlandi verður í Kedron kl. 20.00
***Sunnudagin 23.09.2007.***
Breyðbróting við Læru kl. 11.00.
Evangeliskt møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Børnini at Møtast:***
Børnini møtast kl. 11.00 í kjallaranum í KEDRON, har ØLL børn eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 26.09.2007.***
Húsbólkarnir møtast hjá teimum ymisku, onki Bønarmøtið verður í Kedron.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Familjumøti verður sunnudagin kl. 16. Barnakórið o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin. Ongin sunnudagsskúli og onki møti kl. 18.
Barnakórið venur mikudag kl. 17.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Evangeliskt møti sunnudagin 16/9 kl. 18.
Vitjan á sambýlinum týsdagin 18/9 kl. 19.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 18 møti við Fríðu og Jóhannes Danielsen.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og møti við Gullak og Jónhildu Hansen kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 17/9 húsmøti hjá Elianu og Magnus Olsen, klokkan 20. Ver hjartaliga vælkomin.

**Keldan Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake
Sunnudagin kl. 17 Møti við Monu og John Nielsen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadag 14. september kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 Sunnudagsskúli og Møti v/ Óla Finnson og Kristionnu Vang.
Mikudag 19. september kl. 20 Bíbiltími v/Derhard Olsen. Evnið: Útvald í Kristi.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin er í kirkjutíð kl. 11 í kirkjukjallarinum. Møti verður sunnukvøldið kl. 18, har Jákup Eliassen talar.

**Tabor Toftir**
Umgdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20, har vit fáa vitjan av Ísraels toyminum. Sunnudagin kl. 17 familjumøti, eingin sunnudagsskúli kl. 14. Øll hjartaliga vælkomin.

**Rituvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14, Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Meinhard Bjartalíð.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Vikuskifti fríggjadagin og sunnudagin hevur Bróðurringurin ársmøti í Leirvíkar Missiónshúsi og verða møti fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18 við ymiskum talarum og -sangbólkum og sangkóri. Lýstu møtir eru almenn og tú ert hjartaliga vælkomin at vera við.
Sunnudagin kl 13.30 verður sunnudagsskúli, kl. 18 verður møti við bróðurringinum á havinum og kl. 21 verður ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria!**
Sunnukvøld kl. 18 møti.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti og bíbliutími.

**Tiltøk í KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 - Opið Hús.
Sunnudag kl. 14.00 - Sunnudagsskúli
kl. 18.00 - Familjumøti
kl. 21.00 - Ungdómsmøti.

**Getsemane, á Brekku 19**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Poul Nicolai Steinberg.
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14 er møti. Sunnudagsskúlin er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn-& lovsangur, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin er sunnudagsskúlin kl. 10.30 og møti kl. 18.

**Frá Missiónshúsinum á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við Mórits M Viderø o.ø.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Leygarkvøldið 15. sep. kl. 21 verður ungdómsmøti í missiónshúsinum í Porkeri við Katrin Mortensen, Øravík. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Vitnið í Hvalba - Ungdómsmøti**
Leygarkvøldið 15. sept. verður ungdómsmøti kl. 21 í Vitninum í Hvalba.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hovi**
Møti verður sunnudagin kl. 18 við Jógvan Højgaard trúboðara.

**Sjómanskvinnuringarnir í Suðuroy**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í missiónshúsinum á Tvøroyri leygardagin 22. sept. kl. 18. Báðir sjómanstrúboðararnir verða við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Terja, Mourits og Ednu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Vágur**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagskúli. Kl. 18.00 møti v/ Ben Eli Dam. Øll eru vælkomin.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll hjartaliga vælkomin.

**Kristiligir fundir í DK**
Fríggjakvøldið 14. sept. kl. 19.30 verður kristiligur fundur í Mølleparken, Spangsbergmøllevej 16, Esbjerg. Talarar Levi Joensen og aðrir. Sangkreftir Hans Jákup á Lava og aðrir.
Í Søndarborg vera teir leygarkvøldið 15. kl. 19. Adr.: Skolehjemmet, Sønderlandevej 28.
Sunnukvøldið 16. kl. 17 vera teir í Vejle, adr.: Staldgårdsgade 4. Eftir allar fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 16. september verður gingið: norður undir síðu, Kaldbak. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00. Túrurin er tungur og gingið verður á brattlendi. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og kanska matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425.

**Gongutúrur av Skarvanesi til Kvøldsetu í Dali**
Sunnudagin 16. sept. kl. 14 verður skipað fyri einum gongutúri av Skarvanesi til Dals við ferðaleiðara. Komin til Dals verður kvøldseta kl. 17 við føroyskum mati. Á kvøldsetuni sigur Vilhelmina Larsen frá kvøldsetum fyrr í tíðini. Eisini verður sangur og harmonika. Endað verður við eitt sindur av føroyskum dansi.
Kostnaður kr. 320,- fyri limir og kr. 340,- fyri onnur. Tilmelding á tel. 361836 ella 222078 í seinasta lagi hósdagin 13. sept. kl. 15. Eisini kann tilmeldast á sandinfo@post.olivant.fo

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*